# – Eingin autistur er eins

**– Ert tú saman við 10 autistum, so er eingin teirra eins. Tað eru 10 ymiskar orsøkir til hesa sjúkuna. Spurningurin er bara, hvussu vit hjálpa teimum, tí her finst eingin einføld loysn, sigur svenski yvirlæknin, Christoffer Gillberg. Hann er professari í barna- og ungdómspsykiatri, og hevur seinastu tveir dagarnar hildið skeið í Føroyum, her hann hevur oyst út av vitan síni.**

PSYKIATRI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

– Hvussu hjálpa vit børnum við empati-órógv? Tey eru ikki sum onnur, og tey kunnu heldur ikki seta seg inn í, hvat onnur føla og hugsa.

– Nei, hetta er ikki bara sum at siga tað, tí tey eru so øðrvísi enn onnur. Men samstundis er hvørt einasta teirra unikt, sigur hann.

Fyri fullsettari útvarpshøll greiddi Gillberg frá hesum børnum, sum í barnagarði og skúlagarði skilja seg burtur úr mongdini.

– Men hóast tey skilja seg burtur úr, so hava tey kortini nógvar gávur, sigur hann.

Fyrrapartin í dag tosaði hann nógv um, hvussu ein kann hjálpa hesum børnum. Nú skeiðið endaði seinnapartin vísti hann á, hvussu ein skal fyrihalda seg mótvegis hesum børnum.

Skeiðið var ætlað fakfólkum sum arbeiða júst við hesum barna- og ungdómsbólkinum, eins og foreldrum og avvarðandi. Tað var Psykiatriski Depilin sum tók stig til hesa vitjanina.



*Christoffer Gillberg er væl umtóktur fyrilestrarhaldari. Í gjár og í dag var hann á skeiði í Føroyum. Í morgin gongur leiðir til Boston í USA*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Luttakarnir fingu nógv amboð at arbeiða víðari við hesum bólkinum av sjúklingum, sum eru so ring at skilja* *Mynd: Jens Kr. Vang*

### Vitan vantar

Ein av luttakarunum á skeiðnum er Oddmar Ravnsfjall, sum er lærari við skúlan á Giljanesi.

Hóast hetta evnið átti at havt áhuga fyri lærarar, so vóru ikki so nógvir av teimum at síggja millum luttakararnar.

At Oddmar so fór á skeiðið var orsakað av, at í hansara flokki finst ein næmingur, hvørs eyðkenni eru at finna aftur í tí, sum evnið var á skeiðnum.

– Sum lærarar vita vit ikki nóg mikið um hetta. Hesi børnini koma í okkara skúla, men spurningurin er, um skúlin er til reiðar at møta teimum.

– Her á skeiðnum hava vit fingið eina vitan, sum ger okkum betri før fyri at skilja hesar næmingarnar. Nú duga vit eisini betur at seta okkum inn í støðuna hjá teimum, sigur Oddmar.

Heilt ítøkiligt ætla tey nú at koma við einum uppleggi til leiðsluna á skúlanum við uppskotum um, hvussu ein kann møta hesum næmingum betri í framtíðini.

### Hugsan og kenslur

Við drúgvu royndum sínum innan barna- og ungdómspsykiatri hevur Gillberg gjørt sær sínar hugsanir um hesa sjúkuna, sum á fakmáli kallast empati-órógv. Felags eyðkenni fyri hesi børnini er, at tey hava ringt við at seta seg inn í, hvat onnur bæði hugsa og føla, sigur hann.

Hetta er eisini útgangsstøðið fyri skeiðnum. Tí, sambært Gillberg so er empati-órógv ein felagsnevnari fyri fleiri psykiatriskar sjúkur, sum t.d. Asperger, autismu, Tourettes syndrom og anorexia.

Á skeiðnum gav Gillberg luttakarunum nøkur amboð soleiðis at ein kann staðfesta empati-órógv. Somuleiðis varð eisini víst á, hvussu ein kann hjálpa hesum bólkinum við trupulleikum sínum.

---

# Nýggjur handil skal møta framtíðini

**Fleiri handlar í Klaksvík byggja um fyri at fyrireika seg til Norðoyatunnilin letur upp.**
**Í handlinum Netto fyrireika tey seg eisini til hetta við eini munandi umbygging og útbygging. Handilin letur upp í næstum, og verður opin frá morgni til myrkurs.**

HANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Klaksvík: Í eina tíð hava tey í Netto arbeitt við at útbyggja og nútíðargera handilin til henda stóra dagin.

Higartil er komið fram, at ætlanin var at geva handlinum rúmari ræsur í framtíðini.

– Men ætlanir okkara eru víðfevndari enn so, upplýsa eigararnir báðir, Álvur Klakk og Jóhanna Christiansen.

Skipanin er hon, at Álvur sum setti hesa byggingina í gongd eigur framvegis meginpartin av eginpeninginum í Netto, meðan Jóhanna virkar sum dagligur leiðari.

Soleiðis verða tveir handlar hereftir í teirri samlaðu byggiætlanini framvið Klaksvíksvegnum.

Arbeiðinum við nýggja handlinum líður so mikið væl, at opið verður væl áðrenn Norðoyatunnilin letur upp.

### Opið allan dagin

Netto er ein handil, sum nógvir klaksvíkingar hava brúkt hvønn einasta dag til tað dagliga innkeypið.

Tað fara teir ivaleyst eisini at gera í framtíðini. Munurin er bert tann, at handilin og úrvalið er lagað nógv meiri eftir tørvinum í dag.

Verandi handil verður nevniliga bæði umbygdur og nútímansgjørdur. Dentur fer at verða lagdur á bakaravørur, frukt og grønmeti, umframt alt tað, sum eitt vanligt húski hevur brúk fyri.

– Upplatingartíðirnar verða broyttar soleiðis at framyvir verður opið frá kl. 7 á morgni og til kl. 23, upplýsa eigararnir.

### Tvey nøvn

Undir liðini á tí gamla bygninginum verður haraftrat ein nýggjur bygningur gjørdur. Hesin bygningurin, ið er meiri enn 600 fermetrar til støddar verður gjørdur eftir sama leisti sum stóri, og eisini væl umtókti matvøruhandilin INN við Norðskála, sum Jaspur Johannesen eigur.

Støðan er eisini hon, at Jaspur, ið er ein av partaeigarunum í samtakinum, verður saman við Álvuri og Jóhonnu við til at gera bygningin í nýggju og stóru handilshølunum.

Neyðugt er eisini við einum navni aftrat, nú handlarnir gerast tveir í tali.

Avgjørt er at varðveita ta kenda Netto-navnið í verandi handilshølum, meðan INN verður navnið á nýggja handlinum.

– Á henda hátt verður hildið fast við upprunaligu ætlanina at nýta verandi navnið, verður sagt.

Hetta fer at skapa fyrimunir fyri raksturin við felags innkeypi og marknaðarføring hjá hesum báðum stórhandlunum sum klaksvíkingar, norðoyingar og føroyingar annars fáa høvið at vitja í framtíðini.




*Astrid við kassan tekur sær av einum av viðskiftafólkunum í morgun.* *Mynd: Vilmund Jacobsen*